




# Heilsumál



ÓSKAR EIRIKSSON
Fólkaflokkurin

Fólkaheilsa og ítróttur hanga óloysiliga saman.

Sum nevnt í einum av fyrru greinum mínum, so eru tilboðini til tey yvir 30 – 35 ára gomlu sera avmarkaði. Og tað er ongantíð so týdningarmikið, sum tá vit koma yvir hendan aldurin, at vit fara miðvíst til verka at halda likam og sál viðlíka.

Vælferðarsjúkur, har vit stutt sagt "fylla meira á" enn vit hava fyri neyðuni, samstundis sum vit okkara dagliga yrki krevur minni og minni rørslu av okkum, krevja alt ov nógv mannalív í alt ov ungum árum.

Og fleiri fólk fáa varug mein, sum so gera, at teirra lívsgóðska, aftaná at sjúka rakar tey, verður á einum sera lágum støði.

Lat okkum fyribyrgja heldur enn at royna at lappa.

Lat okkum síggja henda verðuleika í eyguni og gera sum aðrir hava gjørt við góðum úrsliti.

Pláss er í Føroyum fyri 6 golfvøllum at byrja við.

Lat okkum miðvíst fara undir eina ætlan, sum nútíðarsamfelagið Føroyar hevur brúk fyri í so stóran mun.

Kross við Fólkaflokkin. Her virka vit!

Les meira á www.folkaflokkurin.fo

# Ein tunnil útilokar ikki ein skúla



RODMUNDUR NIELSEN
valevni Fólkaflokksins á Lista A, sjálvandi!

Havandi í huga framtíðar menning av samfelagnum, er tað týðandi, at samferðslan verður útbygd, her verður hugsað um tunnlar undir og omanfyri sjóvarmálan og vegir. Og er tað av størsta týdningi at figgingarmynstrið av hesum íløgum verður soleiðis, at tað eisini er pláss fyri øðrum útbyggingum av samfelag okkara, sum skal mennast enn meira komandi árini.

Íløgur í samferðslukervið eiga ikki at vera blandaðar saman við eitt nú bygging av skúlum og ellisheimum. Við skilagóðari fíggjarstýring og við dirvi at hyggja inn í framtíðina verður pláss fyri báðum.

# Nita Næs, Javnaðarflokkurin og eftirskúlin



JOHAN DAHL
løgtingsmaður, Sambandsflokkurin

Tað var ótrúligt at hoyra hesa nýggju rødd Javnaðarfloksins á valfundinum í Trongisvági reypa av ætlanini við eftirskúlanum í Hvalba.

Eg fekk tíverri ikki møguleikan at svara henni aftur, tí hesar linjur.

Nita Næs - hví var tú ikki erlig og segði sum var, at tú ynskir eftirskúlan har pipari grør júst soleiðis, sum tú og onnur argumenteraði móti honum á fundinum í Hvalba um eftirskúlan??

Vit vita at eftirskúlin als ikki hevur verið nakað hjartabarn hjá Javnaðarflokkinum, vit drógu hann til trogið – men ongantí betur um hann nú eisini vil verða við í átakinum.

# Mín støða í sjálvstýrismálinum



HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Eg má siga, at fatanin, at tað bert eru tveir møguleikar, annaðhvørt loysing ella samband, er størsta forðingin fyri framburði á sjálvstýrisleið.

Nógv hava spurt meg skrivliga og munnliga, hvør støða mín er í sjálvstýrismálinum.

Eg hugsi ikki at nakar ivast í, at eg haldi, at Føroyar eiga at ganga framá í sjálvstýrisspurninginum, og at tað er ein fortreyt fyri, at samfelagið kann mennast, at búskapurin kann mennast, og harvið eisini at vælferðin kann mennast.

Eg síggi onga andsøgn millum ta sosialdemokratisku hugsjónina – tað skandinaviska modellið, sum hevur prógvað seg sum bestu samfelagsskipan í heiminum yvirhøvur - og so viljan hjá einari tjóð, at gerast sjálvbjargin og at taka ábyrgd av egnum viðurskiftum. Eg haldi tvørturímóti, at hesi bæði mál hanga saman. Sjálvsagt er tað umráðandi, at øll eru trygg við gongdina, og at fólkið er samt um tey stig, sum verða tikin.

**Gongdin ímóti sjálvbjargni er avbjóðingin**

Tað er gongdin, prosessin fram móti størri sjálvbjargni, sum er avbjóðingin. Tað er ikki avgerandi at seta dagfesting ella okkurt ultimativt ártal á. Javnaðarflokkurin hevur gjøgnum formannin alment boðað frá, at Føroyar eiga at vera búskaparliga sjálvberandi í 2015. Og tað er eitt gott mál at seta sær. Og tað má ikki sleppast, fyri tað um tað annaðhvørt gongur skjótari ella seinni. Um tað verður í 2014 ella í 2016, er ikki alt avgerandi. Tað eru 21 mál eftir at yvirtaka, og tað er ikki løtuverk.

Í hesum samgonguskeiði eru framstig gjørd. Flogvøllurin er yvirtikin, fjølmiðlaábyrgdin er yvirtikin, tilbúgvingin er yvirtikin og nú til seinast er kirkjan yvirtikin. Tað hevur verið arbeitt miðvíst fyri at økja um rættindi okkara uttanríkispolitiskt., og at vinna okkum frælsi til fríar flutning av vørum, tænastum, kapitali og arbeiðsmegi millumlanda. Øll framstig á sjálvtýrisleið eru tikin saman við javnaðarflokkinum – minnist bert til undirgrundina. Størsta frambrot fyri Føroyar í nýggjari tíð.

Enn eru vit ikki komin á mál. Málið er, at Føroyar í einum alsamt meira altjóðaggjørdum heimi, fáa fult uttanríkispolitiskt virkisføri, og at okkara búskapur verður sjálvberandi.

Og tað er ein stór avbjóðing. Og eg vóni, at eg kann vera við til at taka tey tøk, sum skulu takast.

# Vit eiga at merkja tað



PETUR Í GONG
Tjóðveldi
www.tjodveldi.fo/petur

Vit eiga at leggja okkum eftir at vera í fremstu røð. Vit eiga at leggja okkum eftir, at okkara útflutningur lýkur tey krøv, ið brúkarin í grannalondunum krevur. Einans á henda hátt tryggja vit okkum ein marknað og eitt nøktandi útflutningsvirði.

Sum formaður í Brúkarasamtakinum havi eg fylgt væl við, hvussu leikluturin hjá brúkarunum í grannalondunum er vorðin styrktur, við tað at alt vanligari er at umhvørvismerkja vørur og tænastur. T.d. hava Norðurlond leingi nýtt Svanamerkið, meðan ES-blóman er tilsvarandi merki hjá ES. Hesi merki siga, at vøran er virkað á mest skynsama hátt. Keypir tú vøru við hesum merkjum, gert tú okkum øllum eina tænastu.

Tá talan er um ljósan við, eru sjáldan trupulleikar við tí burðardygga. Norðurlond eru nevnliga før fyri at metta egnan marknað við burðardyggari skógarvinnu. Hinvegin eru trupulleikarnir sera stórir, tá talan er um myrkan við. Her er so nógv tann størsti parturin høgdur uttan fyri altjóða góðkendar skipanir og kann eisini ávísast at vera óburðardyggur. Tí ræður um at halda eyguni serliga væl við merking av slíkum viði, ið er vanligur til t.d. vindeygu, havamøblar og bátadekk. Hyggið her eftir merkingini FSC (Forest Steward Ship Counsil), ið er tað merki, sum hevur vunnið størstu altjóða viðurkenningina.

Tá talan er um at fáa altjóða viðurkenning fyri sína burðardyggu vøru, er sostatt ikki nøktandi, at tað einans er ein sjálvur, ið trýr uppá framleiðsluháttin. Vit noyðast at taka undir við altjóða viðurkendum merkingum. Tí er tað fyri okkum serliga viðkomandi at seta okkum inn í, hvussu fiskavørur verða merktar. Og her er tað, at merkingin MSC (Marine Steward Ship Counsil) kemur upp í leikin.

Á marknaðinum í Evropa hevur leingi verið snakkað um at umhvørvismerkja fisk og annað úr havinum. Leingi hevur verið frammi, at heimshøvini eru um at tømast fyri fisk. Avleiðingin av hesum er tann, at brúkarin er vaknaður og er farin at seta krøv. Mann ynskir ikki at stuðla oyðandi veiðu og vil tí hava eitt amboð at velja tær vørur frá, ið ikki vísa náttúruni ans.

Sum øllum kunnugt er høvuðsútflutningur okkara fiskur. Og her snakka vit um fisk, ið ikki er umhvørvismerktur. Eg skal ikki koyra alt í sama pott, tí eg veit, at tað eru útflytarar, ið arbeiða við júst hesum; men fyri tað mesta verður tað blinda eygað vent til, og mann vónar bara tað besta.

Um vit áhaldandi einki gera við at umleggja fiskivinnuna til burðardygga veiðu sambært altjóða viðurkendari merking, verða avleiðingarnar helst tær, at brúkarin í grannalondunum velur at lata vera við at keypa føroyskan fisk. At nevna avleiðingarnar, ið hetta fær fyri okkara búskap, skuldi ikki verið neyðugt.

Og vit eiga at minnast til, at eingin kundi er verri at fáa fatur á enn ein mistur kundi.

Á løgtingsvalinum tann 19. januar verður tað upp til tín at gera av, hvørjir flokkar skulu mynda landsins leiðslu. Fellur hetta valið á Tjóðveldi, velur tú trygd fyri, at málið um umhvørvismerking verður tikið upp og loyst á ein skynsaman hátt, landinum at frama.

# Miðflokkurin atkvøddi fyri



FRÍÐTÓR DEBES
Miðflokkurin
X við lista H

Tá Sandoyartunnilin var fyri í Tinginum við endan av 2007, tá atkvøddu allir 3 tinglimirnir hjá Miðflokkinum fyri, at undirsjóartunnil til Sandoynna skuldi gerast veruleiki. Hetta fegnast vit um.

Tað er við gleði, at eg stilli upp fyri Miðflokkin, tí eg veit, at Miðflokkurin vil gjarna at útjaðarin í landi okkara skal hava tað gott og mennast. Vit koma ikki uttan um, at skal Sandoynni lív vera lagað, so noyðist ein slíkur tunnil at koma. Og er hann fyrst komin, so trúgvi eg, at tað koma ikki at ganga nógv ár (kanska 15), so verður hol sett á til Suðuroyar. Hetta er einasta gongda leið í longdini.

Eftir Tingsins avgerð er ætlanin at fara í holt við Sandoyartunnilin 1. nov. 2009. Mítt uppskot skal vera til komandi Løgting og Landstýri, beinanvegin at byrja at seta pening av á hvørjum ári – tey næstu 15-20 árini til undirsjóartunnil til Suðuroyar – soleiðis, at nakað av peningi kann vera tøkt, tá verulig roynd fer at verða gjørd at fáa fast samband til Suðuroynna.